# Musikkskúla Miðnám

## Upptøkuroynd

### Tónleikaverk

Umsøkjarin framførir tvey stykkir við ymiskum huglagi. Minst annað stykkið skal framførast við samanspæli.

Viðm. Skúlin útvegar ikki umsøkjarum klaverfylgispælara ella samanspælsbólk til upptøkuroyndina, men skúlin kann hjálpa umsøkjarum at finna ein.

### Prima vsita – secunda vista

Prima vista roynd í blaðsangi (við hjálp frá klaverfylgispælara).

### Fyrisøgn

Endurgeva (syngja) stuttar raddarvenjingar.

Viðm. *Vegleiðing til royndina*

1. Hugsa tær royndina sum eina musikalska heild – eina konsert.
2. Ger tað, sum tú dugir best innan karmar, sum tú kennir teg heima í.
3. Vel eitt torleikastig, sum ikki órógvar musikalska úrslitið.
4. Hugsa fjølbroytni viðvíkjandi tempo og dynamiskum eyðkenni.

# Lesiætlan

## Endamál

1. At menna og styrkja teknisku og musikalsku førleikar næmingsins so teir røkka einum støði, ið svarar til upptøkukrøvini til konservatorium.
2. At menna grundleggjandi førleikar næmingsins sum solistur og ensembletónleikari.
3. At næmingurin verður førur fyri at luttaka í og kennir seg heima í so breiðum parti av rútmiska tónleikaheiminum sum gjørligt bæði viðvíkjandi stíli og sjangru.

## Innihald

Við einum stílsligum fjølbroyttum og breiðum repertoire verður arbeitt við at menna førleikar næmingsins á økjum sum t.d.:

1. Musikalskur framburður
2. Imitatión
3. Teknikkur (fimi)
4. Klangskapan og -menning
5. Motorikkur og koordinatión
6. Nótalesing

## Repertoire

Í høvuðsheitum pop/rock, jazz, blues og folk, men støði verður tikið í hvørjum einstaka næmingi.

# 1. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tveir sangir (uttanat) í ymiskum sjangrum og við ymiskum huglagi.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin greiðir frá og gevur dømi av andadráttsvenjingum og raddarvenjingum, ið eru hentar at duga í samband við upphiting av rødd og kroppi.
2. Næmingurin syngur strofur við teimum fýra funktiónunum, ið verða nýttar innan Complete Vocal Technique: Neutral (við og uttan luft), Curbing, Overdrive, Edge.
3. Næmingurin gevur dømir av effektum, ið kunnu brúkast í rútmiskum sangi: Luft á røddini, vibrato, vocal break, creak.

## Improvisatión

Næmingurin improviserar yvir pop/rock akkordir.

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Teir sjey kirkjutónaskalarnar – ioniski, doriski, frygiski, lydiski, mixolydiski, æoliski, lokriski.

# 2. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tveir ella fleiri sangir (uttanat) í ymiskum sjangrum og við ymiskum huglagi.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin syngur strofur við teimum fýra funktiónunum, ið verða nýttar innan Complete Vocal Technique: Neutral (við og uttan luft), Curbing, Overdrive, Edge.
2. Næmingurin syngur strofur við ymiskum klangi: Myrkt, ljóst og miðal og greiðir frá, hvussu mann broytir klangin.
3. Næmingurin gevur dømir av effektum, ið kunnu brúkast í rútmiskum sangi: Creaking, ornamentation, disortion, scream, growl.

## Improvisatión

Næmingurin improviserar yvir jazz akkordir

## Tónastigar

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar: Harmoniskur moll, jazz moll, melodiskur moll, dur-pentaton og moll-pentaton.

# 3. ársroynd

## Tónleikaverk

Næmingurin framførir tríggjar ella fleiri sangir (uttanat) í ymiskum sjangrum og við ymiskum huglagi. Ein av sangunum skal framførast a capella.

## Secunda vista

Blaðsangur. Næmingurin fær eitt brot úr einum sangi at fyrireika seg uppá dagin fyri royndina, sum verður framført a capella til royndina.

## Sangtekniskir førleikar

1. Næmingurin syngur strofur við teimum fýra funktiónunum, ið verða nýttar innan Complete Vocal Technique: Neutral (við og uttan luft), Curbing, Overdrive, Edge.
2. Næmingurin gevur dømir av miskum effektum, ið kunnu brúkast í rútmiskum sangi: Luft á røddini, vibrato, vocal break, ornamentation, creak, distortion, creaking, scream, growl.

## Improvisatión

Næmingurin improviseraryvir blues akkordir

## Tónastigar o.a.

Næmingurin syngur fylgjandi tónastigar (við solfa): Blues, heiltóna- og kromatiskur tónastigi. *G.G. Tónastigar frá undanfarnum ársroyndum kunnu koma fyri aftur: Harmoniskur moll, jazz moll, melodiskur moll, dur-pentaton og kirkjutónaskalar.*